| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>19. februar 2009 | Blað nr.: 7781<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **19. februar 2009** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 50/09-71/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Halla Samuelsen
Elin Lindenskov
Jógvan Arge
Marin Katrina Frýdal
Bogi Andreasen
Levi Mørk
Jákup Símun Simonsen
Vagnur Johannesen
Sjúrður Olsen
Annfinn Brekkstein
Jan Christiansen

**LUTTÓK IKKI:**
Maria Súsanna Hammer Olsen, ið var uttanlands.

**LUTTÓK EISINI:**

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**53/09 2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 19. februar 2009:** Tikið til eftirtektar.

**54/09 2009-0216**

**Endurskoðan og nútíðargerð av byggisamtykt fyri Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu var av fyrsta sinni gjørd í 1972 sambært løgtingslóg nr. 13 um byggisamtyktir og býarskipan frá 21. mai 1954.

Byggisamtyktin var seinast endurskoðað í 1996 í sambandi við samanlegging av Argja-og Tórshavar kommunu.

Síðani eru nógvar broytingar gjørdar bæði í kortskjalinum og tekstinum tó uttan at hon er hon er endurskoðað sum heild.

Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 2. mai 2005 og býráðið 26. mai 2006 (j.nr. 2005-1123) at seta ein bólk til at endurskoða og nútíðargera byggisamtyktina. Bólkurin var mannaður av býararkitektinum, býarverkfrøðinginum og 3 umboðum frá byggi- og býarskipanarnevndini og at byggi- og býarskipanardeildin skuldi skipa fyri arbeiðinum. Bólkurin hevði nakrar fundir, har ímillum við fólk frá umsitingini, sum dagliga arbeiða við byggisamtyktini. Hetta arbeiðið datt síðani niðurfyri, helst tí at hetta arbeiðið var ov tíðarkrevjandi og aðrar týdningarmiklar arbeiðsuppgávur vóru tiknar framum.

26. november 2006 var samtykt at seta eitt fólk burturav at taka sær av arbeiðinum at endurskoða og nútíðargera almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og seinni tær serstøku byggisamtyktirnar fyri alla kommununa og 5 desember 2007 bleiv hetta staðfest í fíggjarnevndini.

Endamál við arbeiðinum.
Endamálið við at endurskoða og nútíðargera byggisamtyktina fyri TK, er at fáa eitt betur stýriamboð til dagligan rakstur og framtíðar útbyggingar av kommununi.

Harafturat er tað neyðugt at gjøgnumganga verandi byggisamtykt, bæði viðvíkjandi ásetingum og reglum eins og kortskjal, hetta tí at krøv og útbyggingarháttir eru broyttar og samanhangi í byggisamtyktini møguliga ikki er so gott vegna allar tær sjálvstøðugu broytingarnar ið eru framdar seinnu árini.

Uppskot til skipan av arbeiðnum
Byggisamtyktin/býarplanurin er eitt sera týdningarmikið amboð og grundarlag fyri framtíðar útbyggingar av kommununi. Tí er tað neyðugt at øll, sum dagliga arbeiða við byggisamtyktini, føla at tey hava havt ávirkan á hvussu úrslitið verður.

Ætlanin er at skipa arbeiðið sum eitt projekt við eini serstakari nevnd samansett av býráðslimum og umboðum fyri teknisku umsitingina, við heimild í §36 í Ll. Nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, einum projektbólki og 6-7 fylgibólkum. Harafturat er neyðugt við internum og eksternum ráðgevum.

Kári Finnsson kemur at greiða frá málinum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevnd, heilsu- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina góðkennur ætlaðu skipanina av arbeiðinum og velur eina serstaka nevnd við heimild í §36 í Ll. nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, samansett av 2 umboðum fyri byggi- og býarskipanarnevndina, 1 umboð fyri teknisku nevnd, 1 umboð fyri heilsu- og umhvørvisnevndina, tekniska stjóranum, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum, til at standa fyri arbeiðinum at endurskoða og nútímansgera byggisamtyktina. Samstundis verður mælt til, at fylgibólkurin ið settur er sambært býráðssamtykt 26. mai 2005, j. nr. 2005-1123, verður avtikin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at velja Marin Katrinu Frýdal í bólkin.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðið til at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Jógvan Arge og Jan Christiansen, fyri byggi og býarskipanarnevndina, Marin Katrina Frýdal fyri teknisku nevnd og Elin Lindenskov, fyri heilsu- og umhvørvisnevndina.

**55/09** **2001-2229**

**Viðvíkjandi yvirtøku av vegastrekkjunum matr. nr. 680a, Tjarnarlág, og matr. nr. 683n, Fútalág, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Føroya Banki hevur við skrivi, dagfest 31. januar 2008, biðið Tórshavnar kommunu taka støðu til, um kommunan vil yvirtaka vegastrekkjuni á matr.nr. 680a og 683n, sum búgvið eftir Petur í Gong eigur.

Føroya Banki hevur 1. veðrætt í matr.nr. 680a og 1. veðrætt áljóðandi kr. 450.000 í matr.nr. 683n. Skiftirætturin hevur spurt, um bankin vil yvirtaka vegirnir, ella bankin vil kvitta sín veðrætt.

Bankin er ikki sinnaður at yvritaka matr.nr. 683n í Fútalág.

Føroya Banki vil fegin hava, at annaðhvørt íbúgvarnir við Tjarnarlág ella Tórshavnar kommuna yvirtekur matr.nr. 680a í Tjarnarlág.

Um kommunan yvirtekur matr.nr. 680a strikar bankin trygdina, men yvirtøkan skal vera uttan kostnað fyri bankan.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini mælir til, at málið verður beint til ummælis hjá viðkomandi faknevndum.

**Fíggjarnevndin 12. mars 2008:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at yvirtaka vegin.

**Tekniska nevnd 3. apríl 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at yvirtaka matrikul nr. 680a, Tjarnalág, uttan kostnað fyri kommununa og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 16. apríl 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin koma við tilmæli til fundin.

**Ískoyti:**
Eftir at býráðið samtykti at yvirtakað matrikul 680a, hevur Føroya Banki í skrivi frá 23. mai 2008 boða frá, at teir vilja strikað sín veðrætt í matriklinum (2001-2229/9). Í skrivi frá 21. jan. 2009 spyr Skiftirætturin kommununa um, hvørt hon eisini er sinnað at yvirtakað matrikul 683n.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegastrekki á Fútalág við síðuvegum, matr. nr. 683n, treytað av at yvirtøkan er uttan kostnað fyri kommnununa og at møguligir veðrættir verða strikaðir, og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**56/09** **<u>2007-0345</u>**

**<u>Yvirtøka av Poul Juuls gøtu –matr. nr. 1411u, Tórshavn</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi, dagfest 18. november 2006, – móttikið í Snarskivuni 29. januar 2007 – søkja Randi Djurhuus, Lula Dahl og Borgný Djurhuus um at Tórshavnar kommuna yvirtekur vegøkið Poul Juuls gøta, matr. nr. 55-1411u.

Matr. nr. 55-1411u, Poul Juuls gøta, er partur av vegøki í útstykking á matr.nr. 1411a, ið útstykkingarloyvi varð givið til 11. juli .2001 – j.nr. 1999-1906/44. Í sambandi við umsókn um sundurbýti av økinum, dagfest 4. apríl 2002, hevur tekniska deild verið á økinum og staðfest, at útstykkingin, og við tí eisini vegøkið, eru gjørd í samsvari við treytirnar í útstykkingarloyvinum.

Ongar fíggjarligar bindingar eru – sambært Tinglýsingini – á nevnda matr. nr. 1411u.

Sostatt er onki til hindurs fyri, at Tórshavnar kommuna yvirtekur nevnda vegøkið, matr.nr. 1411u, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at yvirtaka Poul Juuls gøtu , matr. nr. 1411u, Tórshavn og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin av plan-og rakstrardeildini mæla til at yvirtaka Poul Juuls gøtu , matr. nr. 1411u, Tórshavn.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**57/09** **<u>2009-0362</u>**

**<u>Víðkan av rampuni undir havnarskrivstovuni.</u>**

Verandi rampa undir havnarskrivstovuni er bygd í 1975, og er hon 16 m breið og 11 metur long..

Í 2005 vóru smávegis umvælingar gjørdar á rampuna, umframt at botnurin bleiv tryggjaður móti undirmating.

Rampan hevur ein gamlan skaða í pelunum, sum eru undir sjóvarmálanum, sum tað einaferð verður neyðugt at umvæla.

Tað er oftani, at bæði Smyril og Norrøna eru í Havn samstundis, og liggur tá annað skipið undir havnarskrivstovuni og hitt undir farstøðini.

Tá tað er nógvur vindur av vestri ella útsynningi, vilja bæði skipini liggja undir havnarskrivstovuni, tí har er betur at koma til og frá á teimum ættunum.

**Rampan:**
Verandi rampa er 16 m breið. Hetta merkir, at Smyril bert fær annað portrið niður, men annars passar rampan rímiliga væl í hædd.

Tað er straks verri, tá Norrøna skal brúka rampuna, tí tá hongur hon einar 10-12 metrar útav. Hetta ger, at tað stendur nógv á rampuni, sum kann fáa skaða. Verandi rampa passar illa í hædd, og hetta ger tað sera trupult at koyra um rampuna, at avgreiðslan gongur sera seint og at botnurin á akførunum javnan tekur í.

Onnur ro-ro skip hava eisini trupult við at brúka rampuna, tí hon er ov smøl, og portrið kemur sostatt at hanga útav.
Til ber at bøta um hetta við at gera rampuna størri.

Um rampan verður breiðkað upp til 25 m, er hetta mett at kosta 7 mió.

Um rampan harumframt eisini verður longd fram við molanum við 6 m, er hetta mett at kosta tilsamans 13 mió.

Ein leinging av rampuni við 6 m ger at vit fáa eina nógv betur rampu, har øll rampan er nýggj, og at umstøðurnar at koyra í land eru nógv betur enn við tí minnu rampuni.

**Fendarar og pullartar:**
Verandi fendarar eru so lágir, at teir koma ikki upp til skipsfendararnar, sum eru ætlaðir at verða tað fyrsta sum tekur, tá skipið kemur til bryggju. Hetta ger, at skipini eru sera útsett fyri at fáa skaða, tá veðrið ikki er til vildar.

Tað ber til at bøta um hetta við at gera sama slag fendarar, sum teir ið eru undir farstøðini.

Tað er ikki heilt vist, hvussu stórur tann aftari pullarturin er, men mett verður, at hann kann brúkast, um nakað verður gjørt afturat honum.

Neyðugt er at gera ein nýggjan 150 ts pullart framman, sum er so høgur, at ferðslan á bryggjuni kann koyra undir.

Tann umtalaða byggingin av rampuni o.ø., skuldi verið væl egnað hjá øllum øðrum ro-ro skipum og ikki bara til verandi skipaferðslu við teirri avmarking, at dýpið er umleið 7 m

Kostnaðurin fyri pullart og fendarar er mettur til kr. 4,5 mió.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum**
Mælt verður til at gera skitsuprojekt og nýggja kostnaðarmeting til rampu, fendarar og pullartar, og at býraðið velur lim í bygginevndina.

**Havnarnevndin 9. februar 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Jákup Símun Simonsen og Vagnur Johannesen í bygginevndina.

**58/09** **<u>2007-1253</u>**

**<u>Flokking av virkjum í Tórshavnar kommunu</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gera uppskot til flokking av virkjum, sí j. nr. 2007-1253/1 Flokkingin ásetir ta frástøðu, ið mett verður at vera neyðug í millum viðkomandi virki og bústaðarøkið, t.e. at hædd verður tikin fyri at minka um ampa av óljóði, dálking og serliga lugtampa. Flokkingin gevur eina hóskandi trygd fyri, at bústaðir, handlar, og onnur virkir ikki verða útsett fyri umhvørvisligum ampum frá vinnuvirksemi og virkar haraftrat fyri at virkir ikki seinri fáa ásett skerpaði umhvørviskrøv.

Flokkingin er býtt upp í 7 flokkar, alt eftir hvussu dálkandi virkið verður mett at vera, har flokkur 1 eru virkir við lægst umhvørvisligum ampum og flokkur 7 eru virkir, ið hava stóra ávirkan á umhvørvið, sí j.nr. 2007-1253. Flokkingin kann nýtast í sambandi við tá virkir verða víst til økir í kommununi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður undir við hjálagda uppskoti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum um vegleiðing fyri flokking av virkjum sum var framlagt á fundinum (j.nr. 2007-1253/2) og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Sjúrður Olsen var ikki við til hetta málið.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum um vegleiðing fyri flokking av virkjum, sum var framlagt á fundinum (j.nr. 2007-1253/2).

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**59/09** **<u>2009-0168</u>**

**<u>Heimildarplanur</u>**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Umsitingin biður byggi- og býarskipanarnevndina um at fáa góðkent heimildarplan sum umsitingin hevur gjørt og sum heimilar umsitingini sjálv at avgreiða byggimál har søkt verður um undantaksloyvi av lítlum týdningi.

<u>Lógir, ásetingar o.a.:</u>

**Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.**

Við heimild í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 32 frá 30. apríl 2007, hevur Tórshavnar kommuna gjørt býarskipan, byggisamtyktir og serstakar byggisamtyktir.

Í § 10. ”Virkan av góðkendum byggisamtyktum” stendur:
Góðkenda byggisamtykt skulu virða ikki bara teir, ið ognina eiga og nýta, men eisini teir, sum í henni eiga veð og aðrar, sum rættindi í henni hava, uttan mark fyri, nær ið hesi rættindi eru fingin.
Stk. 2. Á einum øki, sum góðkend byggisamtykt umfatar, skal annars eingin ogn verða nýtt, verða bygd við nýggjum húsum ella verða umbygd ella sundurbýtt uttan samsvarandi byggisamtyktini.

**Almenna Byggisamtykin fyri Tórshavnar kommunu**

Í Almennu byggisamtykini fyri Tórshavnar kommunu, Kap.1 umsitingarligar fyriskipanir, stendur:

<u>§ 1. Byggivaldið</u>
1. Byggivaldið í Tórshavnar kommunu hevur býráðið sambært løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir (byggi- og býarskipanarnevnd býráðsins).
2. Byggifulltrúin hevur býráðsins vegna eftirlit við, at byggisamtyktirnar verða hildnar, og umsitur tær.

<u>§ 9. Undantaksloyvi</u>
1. Byggivaldið kann, har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi, geva lættar viðvíkjandi ásetingunum í hesari byggisamtykt.
2. Áðrenn undantaksloyvi verður givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur, frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi og skulu haldast innanhýsis hjá byggivaldinum.

<u>Upplýsingar frá umsitingini:</u>

Fyri at fáa eina skjóta og lættari málsviðgerð í teimum byggimálum, har søkt verður um undantaksloyvi av lítlum týdningi, hevur umsitingin gjørt uppskot til

ein heimildarplan, har umsitingin fær heimild til sjálv at avgreiða byggimál har søkt verður um undantaksloyvi av lítlum týdningi.

Verður hetta samtykt, er ætlanin framyvir at dagføra hesa ætlan við at biðja um nýggjar heimildir har nevndin metir at tað er ráðiligt. Tað ber sjálvandi framvegis til hjá nevndarlimunum at fáa eitthvørt mál sett á skránna til nevndarfund, sambært fundarskipanini §6, 2. petti. Líka sum tað ber til at taka mál av aftur heimildarplaninum um tað vísir seg ikki at virka eftir ætlan.

Í fyrstu atløgu verður biðið um fylgjandi heimildir:

1. Leingjan av byggiloyvi
2. Bygging uttan loyvi
3. Hoyring
4. Byggiloyvi til tvíhús
5. Byggistig og nettonýtslustig í A1
6. Nettonýtslustig í A3
7. Hæddar- og frástøðuviðurskiftum húsanna

Sí hjálagda heimildarplan, dagfesting. 20.01.2009, skjal nr. 2009-0168/3.

Fyri at byggi- og býarskipanarnevndin skal verða kunnað um, hvørji mál eru avgreidd, er ætlanin at umsitingin á hvørjum fundi í nevndini leggur fram eitt yvirlit yvir avgeidd mál.

<u>Umhvørvisárin:</u>
Eingin

<u>Fíggjarligt:</u>
Ongar bindingar fyri kommununa.

<u>Skjøl:</u>
Heimildarplanur

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna kompetensuplanin.

Sjúrður Olsen var ikki við til hetta málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og góðkendi heimildarplanin, j. nr. 2009-0168/3.

**Býráðið 19. februar 2009:** Tikið av skrá.

**60/09** **<u>2001-2548 VC (sí eisini mál nr. 2008-1341)</u>**

**<u>Viðv. vatnbyrging í Kollafirði</u>**.

Projektering av nevndu byrging er komin so væl áleiðis, at arbeiðið uppá atkomuveg v.m. er um at vera klárt at bjóða út.

Tíðar- og kostnaðarætlan er gjørd, og samlaður kostnaður pr. 24.10.2006 fyri fyribilsbyrging, atkomuveg, høvuðsbyrging og burturbeining av fyribilsbyrging er kr. 28.127.092.

Byrgingin kann takast í brúk á sumri 2009.

Av hesum er fyribilsbyrgingin mett til kr. 858.428, atkomuvegur niðan til byrgingina er mettur til kr. 8.153.952, og rør og kaðalføringar í nevnda vegi er mett til kr. 1.957.929.

Orsakað dálking av Botná í byggitíðini er neyðugt við eini fyribils byrging, ið verður løgd oman fyri arbeiðsøkið, og verður hetta fyrsta byggistig.

Vegna sera trupul vatnviðurskifti í Kollafirði verður Botná, sum ein neyðloysn, brúkt til drekkivatn í dag.

**Tilmæli:**
Leiðarin á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðingurin og tekniski stjórin mæla í fyrsta lagi til, at fyribils byrging og atkomuvegur verða framd í 2007 og at fíggja arbeiðið av íløgum fyri vatn. Í øðrum lagi verður mælt til einans at lata gera fyribils byrging í 2007 fíggjað av íløgum 2007.

**Tekniska nevnd 2. november 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá leiðaranum á vatn- og gøtuljósdeildini, býarverkfrøðinginum og tekniska stjóranum at lata gera fyribils byrging og atkomuveg álj. uml.. 11 mió. kr. at fíggja av íløgum í 2007 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.000.000 til fyribilsbyrging at fíggja av íløgum 2007.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Orsakað av at eingi útlit eru fyri íløgum næstu trý árini í vatnveitingina í Kollafirði, verður her mælt til at játta pening av íløguætlanini fyri 2008.

1. Nýtt vatnreinsiverk kr. 1,000 mill
2. Keyp av lendi kr. 1,500 mill.
3. Fyribilsbyrging kr. 0,850 mill. (varð játtað 16. nov. 2006)

Í alt kr. 3,350 mill.

Í dag verður vatn tikið úr trimum áum, sum serliga á vetri geva stórar trupulleikar, orsakað frost og krapa. Eisini er vatnið sera skitið eftir áarføri og líkur ikki heilsufrøðiligu krøvini. Umsitingin hevur móttikið klagur. Støðan á vatnveitingini í Kollafirði er ikki nøktandi, og er tí umráðandi at fáa eina fyribils vatnbyrging skjótast gjørligt.

Fyri at koma víðari í okkara stremban at fáa eina byrging, mugu ávís krøv frá eigarunum av Ognarmørkini í Todneshaga gangast á møti. Hesi krøv eru m.a. at kommunan ognar sær neyðuga lendið og at øll projektir, sum ávirka hagan, eru liðug og búgvin til viðmerkingar og støðutakan. Víst verður annars til mál nr. 2008-1341/13 í hesum sambandi.

Í løtuni verða uppmálingar av lendi gjørdar av P/F Munin, Føroya Náttúrugripasavn ger árinskanningar og P/F Preben Hansen projekterar. Til hesi endamál var ein mill. kr. játtað, og eru kr. 395.000 tøkar av hesi játtan.

Ein fyribils byrging er mett til kr. 850.000 og keyp av lendi er mett til 54.000 m³ x kr. 27,00 = kr. 1.485.000.
Við vatnverkinum á Velbastað sum fyrimynd, so er nýtt vatnverk í Kollafirði mett til kr. 1,0 mill.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatn- og gøtuljósdeidini mæla til at játta omanfyri nevndu 3,35 mill kr. til keyp av lendi, til gerð av fyribils byrging og nýtt vatnreinsiverk og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 30. oktober 2008:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 2,35 mill. til verkætlanina afturat verandi játtan.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**61/09** **2009-0416**

**Lántøka**

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

Íløgukarmurin fyri árið 2009 er sum hjálagt.

| Bólkur | 2009 |
|---|---|
| Vegir | 22.000 |
| Kloakkir | 7.350 |
| Renovation | 5.700 |
| Kirkjugarðar | 800 |
| Fríðkan av býnum | 3.500 |
| Ítr. og frítíðarv. | 49.000 |
| Barnaansing | 1.000 |
| Skúlar og mentan | 113.500 |
| Eldraøkið | 3.500 |
| Smábátahavnir | 0 |
| Annað | |
| | **206.350** |

Tann samlaði íløgurkarmurin fyri 2009 verður kr. 206.350. Av hesum er neyðugt at lánifíggja kr. 107 mió. í árinum.

Harafturat er neyðugt at taka lán til samtyktar íløgur frá 2008 kr. 63 mió. í staðin fyri tær 100 mió. kr., sum eru samtyktar í fíggjarætlanini fyri 2008. Tann samlaði lánitørvurin fyri 2008 og 2009 verður sostatt kr. 170 mió. Lánið verður goldið aftur yvir 10 ár. Hetta merkir, at lánini er afturgoldið í 2020.

Karmarnir fyri ætlaðar íløgur í 2010, 2011 og 2012 eru:

| Bólkur | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| Tekniska nevnd | 14.000 | 15.000 | 56.000 |
| Byggi- og býarsk.nevnd (fríðkan av býnum) | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| Mentamálanevndin | 107.500 | 50.000 | 29.500 |
| Sosiala nevnd | 3.000 | 10.000 | 9.500 |
| Fíggjarnevndin (smábátahavnir) | 0 | 5.000 | 5.000 |
| | **127.500** | **83.000** | **103.000** |

Íløgukarmurin 2010–2012 merkir, at Tórshavnar kommuna væntandi má taka kr. 30 mió. afturat í láni í 2010. Lánið við ársenda 2012 verður væntandi um kr. 200 mió.

Harafturat er neyðugt at lána til gerð av sethúsagrundum og vinnustykkjum til sølu.

**Tilmæli:**
Stjórarnir mæla til at lána 150 mió. kr. til íløgur.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum, vísandi til frágreiðingina í málinum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen.

**62/09** **2009-0458**

**Tilhald í Tórshavnar kommunu**.

**Lýsing av málinum**
Í sambandi við løgtingsfíggjarlógina fyri 2009 var broyting gjørd í lógini um stuðul til umsorganararbeiði, soleiðis at heimildin at játta stuðul til Tilhald varð strikað. Fyri Tórshavnar kommunu merkir tað, at eingin fígging er í 2009 til tey trý tilhaldini í kommununi: Tilhaldið í Tórsgøtu, Tilhaldið í Nólsoy og Tilhaldið í Kollafirði.

Støðan er tí, at um býráðið ynskir at varðveita tilhaldini í kommununi, má býráðið veita fíggjarliga trygd fyri, at tey kunnu halda áfram.

Á fundum um málið hava greið ynski verið um, at aðrir málbólkar innan eldraøkið eisini brúka Gamla Føroya banka, sum Tilhaldið í Tórsgøtu í dag húsast í, og at fjølbroytt virksemi er í húsinum allan dagin og í vikuskiftunum.

*Nýtsla av Gamla Føroya banka:*
Viðkomandi brúkarar eru í løtuni:
- Tilhaldið í Tórsgøtu, sum er í húsinum í dag, brúkar so at siga øll húsini til ymisk endamál. Virksemið hjá Tilhaldinum er tó ikki í øllum húsinum í senn, og er sum oftast bert millum kl. 9 og 17. Vanliga er einki virksemi í vikuskiftinum.

- Eldraráðið hevur skrivstovuhøli og ráðsfundir í Gamla Føroya banka. Eldraráðið hevur ikki annað virksemi í húsinum.

- Pensjonistafelagið ynskir sær fyrst og fremst eina skrivstovu, har felagið kann hava eitt skáp og nevndarfundir annað hvørt mikukvøld. Harumframt kann partur av virkseminum hjá felagnum, sum í dag við fíggjarligum stuðli frá kommununi er í Losjuni flytast í Gamla Føroya Banka ella posthúskjallaran.

Sæð í mun til verandi nýtslu av húsinum eru umstøður til at nøkta tørvin, sum allir hesir brúkarar hava, í Gamla Føroya Banka.

Virksemið hjá Pensjonistafelagnum verður í dag skipað við sjálvbodnari arbeiðsmegi, og eigur hetta at halda fram.

Fyri at varðveita sum mest av sjálvbodnari arbeiðsmegi, eigur at verða tilskilað í eini reglugerð fyri húsið, at brúkarar sjálvir skipa fyri og rudda upp eftir sær, vaska upp, sløkkja og steingja húsið eftir nýtslu, meðan Tilhaldið fær játtan og ábyrgd av at skipa fyri reingerð eftir tørvi.

*Kostnaður í 2008:*
Játtan hjá Tilhaldinum í Tórsgøtu í 2008 var 667.848 kr. í stuðli frá landinum, í 2008 lat kommunan umframt ein stuðul á 150.000 kr.

Nýtslan hjá Tilhaldinum í Nólsoy var í 2008 257.000 kr.

Nýtslan hjá Tilhaldinum í Kollafirði var í 2008 40.000 kr.

*Normeringar:*
Normering í Tilhaldinum í Tórsgøtu er í dag:
Leiðari fulla tíð
Reingerð 4 tímar um vikuna
Hjálparfólk 16 tímar um vikuna

Normering í Tilhaldinum í Nólsoy
Leiðari hálva tíð
Reingerð 5 tímar um vikuna (læknaviðtaluhølini eru uppií hesi reingerð).

*Kostnaðarmeting 2009:*
Fíggjartørvur tilsamans, um virksemið í øllum tilhaldunum í kommununi skal haldast á sama støði sum lýst er omanfyri, er mett til kr. 1.040.000 kr. býtt á hendan hátt:

| | |
| --- | --- |
| Tilhaldið í Tórsgøtu | 800.000 kr. |
| Tilhaldið í Nólsoy | 200.000 kr. |
| Tilhaldið í Kollafirði | 40.000 kr |

Av hesum kunnu 400.000 kr. fíggjast av konto 40, tiltøk á eldraøkinum í 2009. Eftir at fíggja eru kr. 640.000 kr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at játta Tilhaldinum í Tórsgøtu kr. 800.000 til lønir og rakstur íroknað umsiting av húsunum, reingerð v.m. treytað av, at virksemið í húsinum víðkar til eisini at hýsa Pensjonistafelagnum, sum lýst omanfyri. Mælt verður eisini til, at ein reglugerð verður gjørd fyri felags virksemið í húsinum, sum sosiala nevnd og fíggjarnevndin góðkenna.

Mælt verður somuleiðis til at játta Tilhaldinum í Nólsoy 200.000 kr., og Tilhaldinum í Kollafirði 40.000 kr.

Mælt verður at endan til, at hetta verður fíggjað við 400.000 kr. av konto 40, tiltøk á eldraøkinum, og at heita á fíggjanevndina um at útvega restupphæddina á 640.000 kr.

**Sosiala nevnd 16. februar 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at taka undir við sosialu nevnd og at mæla býráðnum til at fíggja restupphæddina uppá kr. 640.000,- soleiðis:

| | | | |
|---|---|---|---|
| av | konto 40-2491 – | Stuðul til rúsevnismisnýtslu | kr. 200.000 |
| av | konto 41-5190 – | Lækna og heilsumál | kr. 200.000 |
| av | konto 68 – | Útskiftan av amboðum | kr. 240.000 |

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

**63/09** **<u>2008-4671 SG</u>**

**<u>Val av 5 limum og tiltakslimum í barnaverndarnevndina fyri 4 ár</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu sambært § 4, stk. 2 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Í viðmerkingunum til hesa grein stendur, at í teimum størru kommununum, har tað eru nóg nógv fakfólk, eiga fakfólk at manna barnaverndarnevndina.

Viðmerkingarnar tilskila, at lóggevi við viðkomandi førleika ella útbúgving meinar eina miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk, so sum lærari, sjúkrarøktarfrøðingur, fysioterapeutur, ergoterapeutur, sosialráðgevi,

námsfrøðingur. Limir í barnaverndarnevndum kunnu tó eisini vera sálarfrøðingur, lækni o.a.

**Býráðið 20. november 2008:** Tikið av skrá.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Ann Elisabeth Joensen | Poula Eidesgaard |
| Hendrik Thomsen | Sjúrður Johannesen |
| Búi T. Brattaberg | Birgir Sondum |
| Hjørdis Heindriksdóttir | Ingvør í Haraldstovu |
| Miriann Jacobsen | Hildigunn Poulsen |

**Býráðið 19. februar 2009:** Valdur varð Eyðálvur Dimon í staðin fyri Sjúrður Johannesen.

**64/09** **2008-4670/2 SG**

**Val av 7 limum í skattakærunevndina fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar, skal býráðið velja minst 7 limir og tiltakslimir.

Fyrsti fundur hjá nývaldu nevndini verður fyrireikaður av einum av limunum. Kommunan ger sjálv av, hvør tað skal verða.

**Býráðið 20. november 2008:** Tikið av skrá.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu

| **Fastir limir:** | **Tiltakslimir:** |
|---|---|
| Elin H. Joensen | Katrin Gaard |
| Johan Samuelsen | Sjúrður Johannesen |
| Jógvan Martin Mørk | Ingrid Johannesen |
| Ísak Jacobsen | Ragnar Magnessen |
| Albert Isfeld | Rannvá Ragnarsdóttir |
| Annfinn Brekkstein | Jan Christianasen |
| Jógvan Thomsen | Sjúrður Olsen |

**Býráðið 19. februar 2009:** Vald varð Ingrid Henriksen í staðin fyri Ingrid Johannesen.

**65/09** **2009-0266 SG**

**Val av limum í nevndina fyri M. A. Jacobsens virðislønina fyri 4 ár.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært reglugerðina fyri nevndina velur Rithøvundafelag Føroya ein lim, Fróðskaparsetur Føroya (setursráðið) ein lim og Tórshavnar býráð 3 limir.

**Býráðið 29. januar 2009:** Vald vórðu Rigmor Dam, Erling Isholm og Jákup Jacobsen.

**Býráðið 19. februar 2009:** Tikið av skrá.

**66/09** **2009-0278 SG**

**Val av ferðslunevnd**

**Býráðið 29. januar 2009:** Tikið av skrá.

**Býráðið 19. februar 2009:** Tikið av skrá

- Jan Christiansen fór av fundi, meðan mál 67/09 varð viðgjørt.

**67/09** **2009-0553**

**Val av 5 limum í gøtunavnanevndina**

**Býráðið 19. februar 2009:** Vald vórðu Marjun Simonsen, Høgni Mohr, Guðrun Havstein, Johan Hendrik W.. Poulsen og Viggo Christiansen

- Nú kom Jan Christiansen

**68/09** **2009-0275 SG**

**Val av 3 limum í nevndina fyri Sankta Josefs barnagarð.**

Sambært reglugerðina fyri stovnin skal býráðið velja 3 limir, herav 2 eftir tilmæli frá fransikanarsystrunum.

**Býráðið 29. januar 2009:** Valdur var Ragnar Magnussen.

**Býráðið 19. februar 2009:** Vald vórðu Kári Durhuus og Louisa Smets.

## Mál uttan fyri skrá

**69/09** **2008-0257**

**Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Eykajáttan í sambandi við goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi til avgreystur og broyting av vegaskráum í ovara borð**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál j. nr. 2007-2302 : Nevndarviðgerð: Glyvursvegur 5. byggistig – Útbjóðing Arbeiðstøka.

Í sambandi við grevstrararbeiði av 5. stigi av Glyvurvegi er tað staðfest, at tilfarið, ið ætlanin er at nýta til ífyllu v.m., ikki kann nýtast til vegarbeiðið. Heldur ikki ber til at fáa tilfarið flutt á lendið hjá bóndanum, tí tað er so vánaligt. Neyðugt hevur tí verið at flutt tað út í grótbrotið á Glyvursnesi, har ætlaða tyrvingarplássið skal gerast.

Umsitingin fekk øll neyðug loyvir til vega at leggja yvirskotstilfar til bóndan Poul Müller í sambandi við grevsturin, hetta fyri at sleppa frá at koyra tilfarið niðan í Húsahagan. Meiningin var at fáa økið hjá bóndanum til slótturbø.

Nú arbeiðið er byrjað av álvara, vísir tað seg, at tilfarið gjøgnumgangandi er sera vánaligt. Kanningar á starvsstovu og hjá Landsverk vísa, at tilfarið er óegnað til at nakað kann vaksa í tí. Bóndin hevur sýtt fyri at taka ímóti tilfarinum. Tó er nakað av tilfari uttan svørð lagt á goymslu í grótbrotinum til skráar, men her má annað tilfar blandast uppí, fyri at tað kann brúkast sum rájørð. Mold er so at siga ongin á økinum. Her má finnast ein onnur loysn og mold fáast til vega aðrastaðni frá.

Vegaøkið og alt Glyvursnes er ridluskriðaøki og ikki er loyvt at koyra nakað tilfar yvir um Sandá. Hetta hevur ført við sær, at umsitingin hevur verið noydd at troyta arðar møguleikar í sambandi við yvirskotstilfar.

Grótbrotið á Glyvursnesi er einasta loysnin sum er. Tvey økir eru nýtt sum fyribilslagur, tað er økið A og B. Tað triðja økið C verður brúkt til endaliga goymslu. A og B liggja sunnanvert í grótbrotinum og C liggur norðanvert niðan ímóti beninum. Økið C er umleið 6.000 m², 100 m langt og 60 m breitt. Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til avtalu við Búnaðarstovuna og bóndan um økini.

Loysn A:
Fyri at kunna nýta økið C, er verandi vegur niðan á benið hampaður, ein vegur er gjørdur fram við beninum og eitt tippi er fyrireikað. Lastbilar koyra frá vegagerðini “Glyvursvegur 5. byggistig” og út til økið C. Fylt verður síðani í tveir sokallaðar Grísar, og koyrt verður niðan á benið og vippa út av tippinum. Benið er umleið 20 m høgt. Á henda hátt ber til at fáa eina goymslu, sum tekur umleið 70.000 m³ lm.

Loysn B:
Arbeitt hevur eisini verið við at kanna møguleikan at leggja tilfarið upp í rúgvu niðri á sløttum, men henda loysnin ber ikki til í veruleikanum. Tilfarið er ikki til at koyra á við tungum maskinum, og ikki ber til at fylla hægri enn 3 m. Loysn B er tískil vrakað.

Økonomisk viðurskiftir:
Tá ikki ber til at koyra tilfar til bóndan sum ætlað í útbjóðingartilfarinum, inniber hetta fylgjandi:

1. Strekkið verður longri. Tað er frá bóndanum Poul Muller og út í grótbrotið á Glyvursnesi. Víst verður til avtaluseðil nr. 1 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu. Meirkostnaður kr. 300.000,-.
2. Loysn A hevur eina meirútreiðslu tilskilað niðanfyri:
a. Planering av vegi niðan á benið – planerað verður við 0-50 og trumlað. Longd 120 m. Kostnaður kr. 160.000,-.
b. Gerð av vegi fram við beninum uml. 80 m. Kostnaður kr. 120.000,-.
c. Gerð av rampu og stoppklássa uppi á beninum. Kostnaður kr. 45.000,-.
d. Lessing frá fyribilsgoymslu 8 kr/m³ lm, koyring við Grísum 12 kr/m³ og dosing 5 kr/ m³ lm, tvs. 25 kr/ m³ lm at fáa tilfarið frá fyribils goymslu og niðan í økið C. Um vit rokna við 70.000 m³ lm gevur hetta kr. 1.750.000,-.
e. Ein verjugarður av gróti verður gjørdur um neyðugt niðri í brotinum fyri at halda tilfarið innan fyri økið C. Hetta kostar kr. 275.000,- uttan veiting av gróti. Ætlanin er at fáa grót til vega frá Tórshavnar Havn, sum liggur í brotinum. Veiting av gróti er mett til kr. 200.000,-.
3. Samlað meirveiting er mett til kr. 3.000.000,- v/mvg.

Víst verður til avtaluseðil nr. 9 millum Articon P/f og Tórshavnar kommunu.

Kunning til TN um vegakráar í ovara borð:
Neyðugt verður eisini at leggja skráan niður í ovara borð á "Glyvursvegur 5. byggistig. Hetta inniber ein meirkostnað. Ein kann samanlíkna støðuna við vegarbeiðið "Sambindingarvegur Klingran – Løgmannabreyt".
Umsitingin hevur latið gjørt supplerandi kanningar til gjørdar graviroyndir á økinum við Georadara. Nýggir tvørskurðir verða í løtuni gørdir út frá viðurskiftunum á staðnum. Endaligu meirnøgdirnar eru ikki tøkar enn.
Eisini má tilfar til skráar sum rájørð fáast til vega aðrastaðni frá til at blanda uppí tilfar frá staðnum, sum er á goymslu í grótbrotinum á Glyvursnesi. Eisini má mold fáast til vega til skráarnar.
Talan verður eisini talan um minniveiting tí t.d. verður onki tilfar koyrt niðan í Húsahagan.
Ein endalig uppgerð verður gjørd, og málið um skráar og eyka játtan til hetta arbeiðið verður lagt fyri nevndina aftur skjótast.
Roknað er við 10% til ókent í samlaðu kostnaðarmetingini fyri alt vegaarbeiðið. Tað er umleið kr. 2.000.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta kr. 2.000.000,- í sambandi við meirkostnað í sambandi við at sleppa av vit yvirskotstilfar.

**Tekniska nevnd 7. februar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina við áheitan um at fíggja meirkostnaðin av verkætlanini fyri kloakkleiðingina frá útstykkingini undir Kongavarða (j. nr. 2007-0292).

**Fíggjarnevndin 20. februar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. februar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 5. stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

**70/09** **<u>2008-1295</u>**

**Glyvursvegur 6. byggistig: Fyrispurningur frá Articon P/f um at leingja verandi sáttmálan fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata Glyvursvegur 6. byggistig**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Víst verður til mál nr. 2007-1458 - Dispositiónsuppskot: Nevndarviðgerð - Glyvursvegur 6. byggistig.

P/F Articon hava sett fram fyrispurning, um Tórshavnar kommuna er áhuga í at leingja verandi sáttmála fyri Glyvursvegur 5. byggistig til eisini at umfata part av Glyvursvegur 6. byggistig. Tað er frá arbeiðstøkumarki fyri Glyvursveg 5. byggistig og suður um útstykkingina á Hamrinum á Argjum. Somu einleikaprísir verða nýttir sum í verandi projekti.

Verður fyrispurningurin gingin á møti, kemur hetta at spara kommununi eitt sindur av tíð.

Articon P/f ger spreingi- og planeringsarbeiðið í sambandi við nýggja skúlan á Hamrinum á Argjum.

Nú grevstrararbeiðið í sambandi við Glyvursveg 5. byggistig er um at vera liðugt, er møguleiki hjá Articon P/f at halda fram við Glyvursvegur 6. byggistig við tað sama. Eisini er munandi lættari at planleggja arbeiðini, tá tað er sami arbeiðstakari. Her verður eisini hugsað um grótjavnvág. Meiningin er eisini at nýta grót frá skúlanum á Argjum til vegaføringarnar.

Fyritreytirnar viðvíkjandi eigaraviðurskiftunum við Búnaðarstovuna mugu fáast í rættlag, áðrenn farið verður undir arbeiðið.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur í løtuni einki detailprojekt av 6. stigi, og tí er trupult at meta um samlaða kostnaðin fyri verkætlanini. Leystliga mett kemur arbeiðið at kosta uml. 10-12 mió. kr. Strekkið, talan er um, er uml. 450 m.

Onki avsett á fíggjarætlanini fyri 2008 til 6. byggistig, men hinvegin eru avsettar kr. 7,5 mió. til prosjektering av brúgv um Sandá, sum er Glyvursvegur 4. stig. Tað verður tó ikki komið so langt við hesum arbeiði í 2008 sum upprunaliga ætlað. Sama ger seg galdandi fyri aðrar íløgur, ið eru ætlaðar at verða gjørdar í 2008. Tí metir tekniska umsitingin, at tað er møguligt at gera nakrar umraðfestingar innan íløgurnar fyri 2008, við tí fyri eyga at halda fram við arbeiðinum av Glyvursvegnum 6. stig.

Á hesum grundarlagi mælir tekniska umsitingin til at umraðfesta íløgurnar og flyta játtan til Glyvursveg 6. stig soleiðis:

| Konto | Verkætlan | Broyting 2008 | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|
| | Fígging til Glyvursvegur 6. stig | | |
| 11871 | Glyvursvegur 6. stig | 150.000 | restjáttan frá 2007 ella fyrr |
| 11868 | *at flyta frá brúgv um Sandá | 5.000.000 | er viðmælt av bygginevndini á fundi 07.05.08 |
| 11822 | *at flyta frá Glyvursvegur | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11841 | *at flyta frá Reynsgøtu | 400.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11848 | *at flyta frá gongubreyt við Vegin Langa | 300.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11863 | *at flyta frá ferðslutrygd v. Hoyvíkar skúla | 370.000 | flyting av avlopi frá arbeiði sum er liðugt |
| 11889 | *at flyta frá vegagerð á Dánjalstrøð | 2.000.000 | játtan frá 2007 |
| 11875 | *at flyta frá vegur, kloakk o.a. á útstykking á Argjum hjá V. Dalsgaard (komm. partur) | 3.330.000 | játtan frá 2008 |
| | **Tilsamans** | **11.850.000** | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
1. at arbeiða fram ímóti at gera eina avtalu við P/F Articon um kostnað og tíðarætlan fyri leingjan av Glyvursvegi til verandi íbinding til útstykkingina á Hamrinum
2. at játta kr. 11,7 mió. til konto 1011-90-11871 við flytingum, sambært omanfyri standandi yvirliti.
3. at heita á umsitingina fyri keyp og sølu um beinanvegin at gera avtalu við Búnaðarstovuna um keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti Høgni Mikkelsen tekur støðu á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðið 26. mai 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin greiðir frá støðuni í málinum um 6.stig.

**Tekniska nevnd 5. februar 2009:** Kunnað varð um málið.

- Tekniska nevndin skal taka støðu til meirveitingar í sambandi við innanhýsis frágreiðing um fíggjarligu viðurskiftini frá tekniska stjóranum og um niðurstøðuna frá bygginevndini um ikki at koma við tilmæli til teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Einar Brimnes var ikki til staðar undir viðgerðini.

Tekniski stjórin greiddi frá innanhýsis statusfrágreiðingini frá 2. febr. 2009, um 5. og 6. byggistig.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Maria Hammer Olsen og Jákup Símun Simonsen, samtykti at taka spariuppskotini til eftirtektar, og at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 20,4 mió. afturat til 5. og 6. byggistig.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, metir seg ikki kunna taka støðu til málið enn, av tí at hann fekk tilfarið í málinum sama dag, sum fundurin varð hildin.

Marin Katrina Frýdal luttók ikki á fundinum, meðan nevndin viðgjørdi bygginevndina.

Ein meiriluti átalar harðliga handfaringina hjá bygginevnd og umsiting í málinum. Somuleiðis tekur nevndin, ikki undir við, at bygginevndin ikki vil geva nevndini tilmæli í málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009: :** Mál nr. 2008-0257 og 2008-1295 vóru viðgjørd undir einum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd.

Eisini samtykt at seta í verk óvilduga kanning fyri at staðfesta ábyrgd í hesum málum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Einmælt samtykt.

**71/09** **<u>2005-2344 (sí eisini j. nr 2008-3134 )</u>**

**<u>Dispositiónsuppskot: Rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sundsvegur-Óluvugøta</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gjørt 6 ymisk uppskot til rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sundsvegur-Óluvugøta.

Ráðgevandi verkfrøðingurin í málinum p/f Verkfrøðingastovan mælir umsitingini til at arbeiða víðari við uppskoti nr. 4. Víst verður til skjal 2005-2344/1. Ì hesum uppskotinum verður ikki neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at ogna sær lendi frá

grannaognunum, sum eru ognirnar hjá ávikavist Annu Asbjarnardóttir, matr. nr. 1466, Tórshavn, og Sólbjørg Petersen, matr. nr. 1470u, Tórshavn.

Atlit eru eisini gjørd til ferðsluteljingar í økinum og eisini til ferðslumodellið hjá Rambøll Nyvig as, sum framskrivar ferðslumynstrið í Tórshavn fram til 2022. Tó er hædd ikki tikin fyri føstum sambandi millum Tórshavn-Toftir-Strendur.

Umsitingin hevur sett seg í samband við "Dansk Vejdirektoriat" um at projekt-granska fyriliggjandi uppskot við fyrispurningi um fyrimunir og vansar. Eisini eru "Dansk Vejdirektoriat" bidnir um at koma við alternativum uppskoti til loysn, sí skjal nr. 2005-2344/2.

Greitt verður frá niðurstøðuni, sum verður framløgd á fundinum.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur latið gjørt eina kostnaðarmeting í sambandi við uppskot nr. 4, sí mál nr. 2005-2352/1, og eina samlaða kostnaðarmeting íroknað ráðgeving, eftir-liti, umsiting, óvæntaðum útreiðslum og mvg, sí sak nr. 2005-2352/2.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundinum.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Ein meirluti, Katrin Dahl Jakobsen, Leivur Hansen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við uppskotinum frá Vejdirektoratet.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at útseta málið, til aðrar samtyktir í nevndini eru framdar í verki.

Ein annar minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at taka undir við uppskoti nr. 4 frá sp/f Verkfrøðingastovuni.

**Ískoyti:**
Nevndarlimur hevur ynskt málið á skrá. Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd, 7. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at gera uppskot til rundkoyring við støði í samtykt frá 22. september 2005, ið nervar grannaognirnar minst møguligt at leggja fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt fýra nýggj uppskot til rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sundsvegur-Óluvugøta, sí j. nr. 2005-2344/9.

Umsitingin er komin til ta niðurstøðu, at óansæð um rundkoyringin verður flutt norður- og eystureftir, so koma vit so langt inn á økið hjá Onnu Asbjarnadóttir, at nærum helmingurin av ognini verður løgd undir veg.

Eisini skal havast í huga, at um rundkoyringin verður flutt, so mugu innkoyringar-vegirnir frá Blómubrekku og Óluvugøta broytast munandi. Hetta hevur stórar økonomiskar avleiðingar við sær.

Umsitingin metir tað ikki vera rætt tekniskt at flyta rundkoyringina í mun til samtyktina 22. september 2005.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at hildið verður fast um uppskotið til rundkoyring, sí j. nr. 2005-2344/8. Mælt verður til at játta kr. 500.000,00 til projektering og eftirlit og biðja Verkfrøðingastovuna standa fyri hesum.

**Tekniska nevnd, 5. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppruna-uppskotinum j.nr. 2005-2344/12 og at mæla umsitingini til at fara undir samráðingar við eigaran á matr. nr. 1466, Tórshavn, um keyp av ognini.

**Tilmæli:**
Vísandi til at játtan fyri projektering og arbeiði ikki er avsett í fíggjarætlanini fyri 2007 mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at útseta arbeiði við projektering, men at arbeitt verður víðari við samráðingum við eigaran at ogna sær lendi.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um at kommunan ognar sær lendið.

- Formaðurin i teknisku nevnd ynskir at viðgera málið í nevndini.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Nevndin samtykti at skunda undir at samtyktin hjá fíggjarnevndini frá 6. desember 2006 verður framd og at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Samtykt at taka stig til at loysa málið sum skjótast.

- Nú peningur er settur av til verkætlanina á íløguætlanini fyri 2008, skal tekniska nevndin taka støðu til um farast skal undir fyriliggjandi uppskot og síðani mæla fíggjarnevndini til at játta pening til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin.

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 500.000,- til prosjektering og eftirlit av rundkoyring sambært j. nr. 2005-2344/12 og at arbeiðið verður latið ráðgevandi fyritøku at fremja beinan vegin.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av íløgum.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli frá løgdeildini:**
Í sambandi við gerð av rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka – Sundsvegur – Óluvugøta verður neyðugt hjá kommununi at ogna sær uml. 334 fermetrar av matr. nr. 1466, Tórshavn. Eigari av matr. nr. 1466 er Anna Asbjarnardóttir.

Orsakað av skapinum av matr. nr. 1466 og staðsetingini av húsunum á ognini, kemur rundkoyringin at liggja undir 1 metur frá sjálvum húsinum, og kemur at verða til stóran ampa fyri stykkið.

Í hesum sambandi hevur umsitingin hjá kommununi veri í sambandi við Onnu Asbjarnardóttir fyri at finna eina loysn á málinum. Aftaná fund við Onnu Asbjarnardóttir í desember 2007 sendi kommunan henni eitt skriv við 3 uppskotum til loysn á málinum:

1. *Kommunan keypir hús tygara fyri marknaðarvirðið og útvegar tygum annað kommunalt grundstykki, at byggja nýggj hús á. Grundstykki skulu tygum rinda kostprís fyri. Í tíðarskeiðinum, frá at kommunan hevur keypt tygara hús, til nýggju húsini eru liðug og klár at flyta inn í, kunnu tygum verða búgvandi í núverandi húsum.*

2. *Tygum verða búgvandi í húsum tygara, eisini aftaná at rundkoyringin er gjørd. Kommunan rindar tygum so fyri virðislækkingina av ognini, sum stendst av rundkoyringini.*

3. *Kommunan keypir hús tygara fyri marknaðarvirði og tygum nýta peningin at keypa onnur hús fyri. Í tíðarskeiðnum, frá at kommunan hevur keypt tygara hús, til tygum hava funnið onnur hóskandi hús, kunnu tygum verða búgvandi í núverandi húsunum.*

Aftaná fleiri telefonsamrøður og fundir har Anna Asbjarnardóttir møtti saman við Bjørn á Heygum, adv. komu tey við hesum uppskotið til semju:

1. *Partarnir velja ein serkønan óvildugan metingarmann til at virðismeta samlaðu ognina 1466 við ástandandi sethúsum til galdandi handilsvirðið.*

2. *Tá virðismetingin er gjørd, yvirtekur Tórshavnar kommuna eitt umleið 334 m² stórt øki burturav ognini matr. nr. 1466, Tórshavn, til rundkoyring og gongubreyt. Nevnda lendi verður samsvarandi hesum skeytað og avhendað til Tórshavnar kommunu samb. tær í hesum sáttmála galdandi treytir.*

3. *Arbeiðið við at gera rundkoyring skal vera til minst møguligan ampa fyri eigaran av matr. nr. 1466, og skal taka atlit til, at atkomumøguleikarnir verða skerdir minst møguligt.*

4. *Tórshavnar kommuna ger ein ljóðmúr millum rundkoyringina og matr. nr. 1466, Tórshavn, sum verjir ognina móti óljóði og óviðkomandi ferðslu á økinum.*

5. *Tórshavnar kommuna flytur steinin, sum stendur á yvirtikna økinum yvir á eftirverandi stykki á ognini matr. nr. 1466 eftir ávísing eigarans.*

6. *Tórshavnar kommuna syrgir fyri, at ognin matr. nr. 1466, Tórshavn framhaldandi hevur vegaatgongd, soleiðis at bilar kunnu koyra inn til ognina og parkera uttanfyri.*

7. *Tá rundkoyringin er liðug, verður ein nýggj virðismeting gjørd av írestandi ognini við ástandandi sethúsum til galdandi handilsvirðið.*

8. *Endurgjaldið fyri yvirtikna lendi verður roknað sum munurin millum fyrru og seinnu virðismetingina og verða at gjalda eigaranum av matr. nr. 1466, Tórshavn, kontant í seinasta lagið 14 dagar eftir at seinna virðismetingin er gjørd. Verður ikki goldið rættstundis skal Tórshavnar kommuna gjalda 9% í rentu p.a. av tí til eina og hvørja tíð verandi restskuld.*

9. *Eigarin av ognini matr. nr. 1466, Tórshavn, fær í eitt tvey ára skeið eftir seinnu virðismetingina møguleika fyri at velja antin hann vil varðveita írestandi ognina við ástandandi sethúsum ella, at kommunan skal yvirtaka ognina fyri metingarvirðið.*

10. *Velur eigarin at avhenda ognina til Tórshavnar kommunu, skal hann boða kommununi skrivliga frá hesum innan ásetta tvey ára skeiðið er runnið. Tórshavnar kommuna hevur tá skyldu til at yvirtaka ognina móti at gjalda ásetta prísin sambært seinnu virðismetingina. Keypspeningurin skal gjaldast í seinasta lagi 14 dagar eftir at skeyti er tinglýst í navninum hjá Tórshavnar kommunu uttan prejudicerandi rættarviðmerkingar. Verður ikki goldið rættstundis skal Tórshavnar kommuna gjalda 9% í rentu p.a. av tí til eina og hvørja tíð verandi restskuld.*

Við einum seinni skrivi hevur Bjørn á Heygum, adv. gjørt vart við at eigarin ynskti at broyta uppskotið nakað:

*"Eigarin hevur nú gjørt vart við, at hann ynskir eina loysn, har tað undir einum verður gjørd ein virðismeting av samlaðu ognini og umframt frábýtta lendinum á ca. 334 m², sum verður tikið burturav til rundkoyring.*

*Miðað verður sostatt ímóti at fáa eina virðismeting av yvirtikna lendinum beinanvegin, soleiðis at endurgjaldið fyri hendan partin av ognini kann gjaldast eigarunum uttan at bíða til samlaða arbeiðið er liðugt.*

*Hildið verður at hetta er bæði rímiligt og natúrligt, tá endurgjald vanliga verður latið samstundis við, at jørð verður avhendað til nýggjan eigara"*

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini mælir til, at taka av uppskotinum til semju frá eigaranum, tó soleiðis at tíðarskeiðið í pkt. 9 verður eitt ár í staðin fyri tvey ár.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at játta kr. 265.000,- av íløgum fyri vegir í 2009 (av konto fyri Marknagilsvegin) og at játta kr. 385.000,- av játtan til dagføring av Sundsvegnum smb j. nr. 2008-1294.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Maria Súsanna Hammer Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Sjúrður Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |